HEILSANIR

Góði elskaði Andras
Mamma, babba og beiggjarnir ynskja tær tillukku við degnum 27. apr. Eisini ein heilsan til okkara elskaðu Ingrid við degnum 20. apr.
Frá ommu, abba og mammubeiggjunum

Góði Julian
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum. Vónandi fært tú ein góðan dag. Eisini ein heilsan til Elisabeth.
Ynskja omma og abbi

Eru vit ikki fittar
Góða mamma. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 27. apr. Nógv góð ár í framtíðini.
Bestu heilsanir vit á Tórgarðsgøtu

Góða Eva
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum í dag.
Kærar heilsanir Annika, babba og mamma

Góða mamma og babba
Hjartaliga tillukku á silvurbrúðleypsdegnum í dag. Takk fyri alt tit eru fyri okkum.
Ynskja børnini
PS. mostir fær eisini eina heilsu

Góði Hans-Hildibjart
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Alt tað besta.
Mamma og babba

Góða Diana
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum. Alt tað besta.
Mamma og pabba

Góði piparsveinur
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 30!!
Ynskja B-bandin

Góða ommudidd og Kristian
Vit vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku á silvurbrúðleypsdegnum í dag. Alt tað besta ynskja vit tykkum.
Heilsan vit í Saltnesi, Eyðbjørg

Góði Bjørgfinnur
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum, sum var 23. mars. Alt tað besta.
Ynskja mamma og babba

Góði Melanchthon
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 25. Alt tað besta.
Ynskja mamma og babba

Góða Diana
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum. Alt tað besta.
Ynskir systi

»Ha, eg 30 ár?! Nei, tú gall, tað kann ikki vera satt. Síggi eg kanska út sum ein piparsveinur?

Góði babba
Hjartaliga tillukku við runda degnum. Ja, her var annað lívið.
Mamma

Góði Julian
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
Ynskja Elisabeth, mamma og babba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti kl. 12. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
www.livdin.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Hjørdis Petersen, evnið: Tilbiðjan sum lívsstíl.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Magnus Simonsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Oðrsins tænasta v/ kommuniónin í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Andrej Wydrzynski, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

Ebenezer
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Ungdómskórið og barnakórini luttaka. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

Hebron, Argir
Í kvøld kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um 1. Mós. 25-26: Sáttmáli Guds handaður víðari. www.hebron.fo

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Ann Mari og Friðtór Debes, Bringstún 4, Argir.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti. www.rhema.fo

Frelsunarherurin
Tórsgøta 19
Mikudagin kl. 15 Bønarfundur. Barnarøddir kl. 18.30.
Mennirnir samlast kl. 19.30.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Sunnudag hava vit vitjan av feltsersjant Irene og Eyðun Christiansen.

Meinigheitshúsið
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagur kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tom Skaale, Manskórið syngur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia Landavegur 22
Í dag kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið er »Jesus felsari heimsins«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið er »At lata seg fylla av Heilaga Andanum«. 1. partur v/ Óla Jacobsen, kl. 18 Evangel. møti v/ Sonna Djurhuus.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

KFUM og KFUK í Havn
Mikudagin kl. 19.30 í KFUK: Jørmund Foldbo hevur fyrilestur, um at byggja brýr. Fyrilesturin er um áhugamál hjá ungum og eldri. Av hesum sama verður onki hóskvøldið.

Nazaret, Kaldbak
Á møtinum í kvøld greiðir Ragnar Niclasen frá trúboðaravirksemi á Filipsoyggjunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið opið hús kl. 21 við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Einar Joensen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen trúb. Evnið: Byggja brúgv. Innsamling til húsið. Aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð, Saltangará
Bønarmøti verður í kvøld kl. 20.
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30, Rickard Danielsen talar. Evnið: Líðingar Kristusar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Norðurstreymoy
Landsstevnan hjá sjómanskvinnuringunum verður í Nesvík 14.-16. mai.

Missiónshúsið í Skopun
Í kvøld kl. 20 Bibliutími. Øll eru vælkomin.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Í kvøld kl. 19 Juniorsoldátamøti.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 26. apríl
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
Túrur í Kalsoynna mikudagin 5. mai. Úr Steinatúni kl. 8.10. Aftur í Havnini um 20.30 tíðina. Tilmeld. 316491
Týsdagur 27. apríl
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Ábyrgd fyri egnari heilsu. Laila á Lofti, fysioterapeutur
Mikudagur 28. apríl
kl. 10-12 Handverk
kl. 12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 14-16 Undirvísing í boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur niðan á Kongaminni
Hósdagur 29. apríl
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagur 30. apríl
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eysturoyar Gongufelag
Sunnudagin 2. mai verður gingið frá Gøtueiði og norðureftir. Vit møtast á Gøtueiði kl. 14. Staðkendur ferðaleiðari verður við á túrinum. Tilmelding er ikki neyðug.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 18. apríl
Mikudagin er tilhaldið stongt vegna skeið. Opið er aftur sum vanligt mánadagin.
Mánadagin 10. mai kemur Absalon Matras úr Klakksvík at siga frá um Rumenien og frá túrum, hann hevur verið í Rumenia.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 24. apríl
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 25. apríl
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 26. apríl
Vit vitja Smoltstøðina á Glyvradali
Hósdagin 27. apríl
Prát og sangur
Fríggjadagin 28. apríl
Opið hús

Tú fært altið ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altið til taks.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmødrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Allir fundir eru roykfriir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontið er friggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Sveriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altið eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Mikudagin 28.04. kl. 17[00]
Mikudagin 28.04. kl. 19[45]
Mikudagin 28.04. kl. 22[30]
Hósdagin 29.04. kl. 17[00]
Hósdagin 29.04. kl. 19[45]
Hósdagin 29.04. kl. 22[30]

Mikudagin 28.04. kl. 22[00]
Hósdagin 29.04. kl. 22[00]
– Seinasta sýning

Mikudagin 28.04. kl. 19[15]
Hósdagin 29.04. kl. 19[15]

Mikudagin 28.04. kl. 16[00]
Hósdagin 29.04. kl. 16[00]
– Seinasta sýning

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 30.04.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu